## Netanyahu skal takast

Løgreglan í Dubai ætlar sær at senda út eina altjóða áheitan um, at ísraelski forsætisráðharrin, Benjamin Netanyahu (myndin), skal handtakast í sambandi við tilburðin, tá ein Hamas-leiðari bleiv myrdur á einum hotelli í Dubai. Myndugleikarnir í Dubai ivast ikki í, at tað vóru agentar hjá ísraelsku fregnartænastuni, sum myrdu Hamas-leiðaran, og tí fara teir eisini at geva boð um, at leiðarin í fregnartænastuni Mossad skal handtakast. Ísraelska stjórnin hevur ikki gjørt nakrar viðmerkingar til málið, men tað ger hon ikki, tá talan er um virksemið hjá fregnartænastuni.



## Ávaringin ikki nóg góð

Granskarar fara nú at kanna, hvussu tað kundi bera til, at flóðaldan frá tí harða jarðskjálvtanum í Kili ikki var størri, enn hon var. Beint eftir skjálvtan bleiv sagt, at stórar aldur fóru at skola inn yvir tær lágu oyggjarnar í Kyrrahavinum, og at tær fóru at oyðileggja alt. Men tær stóru aldurnar komu ongantíð. Gerard Fryer á amerikanska ávaringarstovninum Pacific Tsunami Warning Center sigur við Reuters, at tað var rætt at boða frá flóðalduvanda um alt Kyrrahavið, men at tað nú er neyðygt at fáa staðfest, hví flóðaldan ikki bleiv størri.

# óti botni






– úr 13.000 tonsum niður í 5.800 tons.

### Hini fiskasløgini eisini horvin

Ein av teimum heilt stóru postunum í fiskaútflutninginum er tann høvuðsbólkurin, sum eitur onnur fiskasløg. Hesi fiskasløgini hava javnt staðið fyri størri og størri parti av útflutninginum síðani 1999. Upphæddin fyri hesi fiskasløgini er farin úr 659 milliónum krónum í 1999 og er vaksið javnt uppeftir, til tað í 2006 toppaði á 1.228 milliónum krónum.

Men eins og við toskinum, hýsuni og svartkjaftinum, so er hesin bólkurin farin rapandi niðureftir seinastu fáu árini.

Eftir metgóða árið í 2006, minkaði henda upphæddin í 2007 niður á 1.163 milliónur krónur. Hetta er tó eingin alarmerandi upphædd, tá hetta eisini er í absolutt betra endanum. Gongdin heldur tó fram í 2008. Tá er úrslitið í hesum bólkinum minkað niður í 825 milliónir krónur. Fallið er tó ikki liðugt, tí í 2009 gjørdist úrslitið í hesum bólki 693 milliónir krónur – ein minking á 535 milliónir eftir trimum árum, svarandi til 48 prosent.

### Laksur og upsi eru bjargingin

Tað eru hinvegin laksurin, sílini og upsin, sum hála tølini uppeftir í 2009.

Vit útfluttu fyri 1,2 milliard krónur av laksi í 2009, sum er 47 prosent meira enn í 2008, tá vit útfluttu fyri 816 milliónir krónur av laksi.

Fyri árið 2010 komna hesi tølini tó ikki at verða so eins stór, tá minni av laksi er tøkur at taka í 2010, enn í 2009, av tí at minni av smolti er sett út og tískil verður minni at taka av.

Útflutningurin av sílum vaks eisini við 27 prosentum, úr 137 milliónum krónum upp í 175 milliónir krónur og útflutningurin av upsa við góðum 15 prosentum, úr 494 milliónum krónm upp í 571 milliónir krónur.

Harumframt eiga sildin og makrelurin sín stóra leiklut í, at tølini samlaðu tølini fyri 2008 og 2009 ikki eru verri enn tað sama. Hóast bæði sild og makrelur í 2009 gingu aftur við góðum 11 og 13 prosentum, er talan enn um lutfalsliga stórar inntøkur av hesum báðum fiskasløgunum – ávikavist 130 og 152 milliónir krónur í 2009.

### Hepni

Útflutningurin tilsamans, um skip, flogfør og annað tílíkt ikki verða tikin við, vaks frá 2008 til 2009 við einum prosenti, úr 3718 milliónum krónum upp í 3760 milliónir krónur.

So kann ein spyrja, hvat er tá trupulleikin?

Ein kann freistast at draga tað niðurstøðu, at orsøkin til at tað ikki hevur gingið verri við útflutninginum av fiski, í heilt stóran mun skyldast hepni.

Um vit taka toski fyrst og fremst, so hevur ein óvanliga góður miðalprísur fyri hvørt kilo av útfluttum toski bjargað árunum 2007 og 2008.

Meðan eitt miðalár síðan ár 2001 liggur um gott og væl 31 krónur fyri hvørt útflutt kilo av toski, fingu vit í árunum 2007 og 2008 ávikavist 45,6 krónur og 45,3 krónur fyri hvørt kilo. Hetta er høvuðsorsøkin til, at svinnandi nøgdin av toski ikki merktist eins væl.

Harumframt kann tað illa kallast annað enn eitt ótrúliga heppið samanfall, at samstundis sum føroyska alivinnan var við at fóta sær, og vit í 2008 aftur tóku omanfyri 30.000 tons av laksi fyri fyrstu ferð síðani 2004, so varð kilenska alivinnan tvungin niður til kníggja av ILA, og tað ovurstóra holið hetta skapti á laksamarknaðinum gjørdi, at prísurin á alilaksi fór til himmals.

Høvdu vit hinvegin ikki verið so »heppin«, at kilenska alivinnan fór í sor, høvdu kanska 4- ella 500 milliónir ella meira manglað í í fjør.

### Kanska tað vendir

Vit vita tó, at í ár verður ikki eins nógvur laksur tikin í Føroyum, sum í fjør. Vit vita eisini, at Noreg ger sær dælt av støðuni og hevur av álvara strongt á fyri at framleiða laks. Vit hava eisini sæð hjá okkum sjálvum, at tað kann ganga skjótt at fóta sær aftur eftir eitt útbrot av ILA. Tí kann roknast við, at Kili aftur innan alt ov leingi verður við á laksamarknaðinum aftur.

Hvar vit føroyingar tá standa, er ilt at gita um. Tað kann verða, at fiskifrøðingarnir fara skeivir, og toskurin bara hevur goymt seg fyri okkum, men kemur framm aftur.

Tað kann eisini vera, at ICES fær eyguni upp, tá Jacob Vestergaard er liðugur við sína reklamuherferð fyri burðardyggari føroyskari fiskiveiðu, og vit so aftur fáa burðardygga brúkaran á okkara lið.

Møguleikarnir eru nógvir fyri framtíðina og ringir at spáa um, men tølini tala fyri seg, og seinastu fimm árini hava fleiri týðandi fiskabarometur havt pílin vendan móti botninum.

### Útflutningur skift á eind, vørubólkar og ár

| | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|
| Toskur | 653,387.00 | 595,268.00 | 641,143.40 | 604,828.60 | 402,184.60 |
| Hýsa | 332,168.70 | 318,874.80 | 322,508.60 | 171,327.40 | 99,054.40 |
| Upsi | 448,831.40 | 573,601.50 | 495,053.50 | 494,241.80 | 571,829.70 |
| Laksur | 439,852.00 | 374,319.90 | 492,660.70 | 816,902.40 | 1,200,945.20 |
| Síl | 58,674.30 | 98,858.50 | 100,773.10 | 137,733.40 | 175,081.70 |
| Svartkjaftur | 125,975.40 | 170,758.00 | 184,367.50 | 52,410.40 | 30,581.80 |
| Sild | 112,438.10 | 122,846.10 | 123,143.70 | 146,437.00 | 130,476.90 |
| Makrelur | 106,095.70 | 69,174.40 | 204,359.20 | 174,749.10 | 152,035.50 |
| Rækjur | 98,055.30 | 89,476.80 | 94,352.70 | 116,609.10 | 91,228.50 |
| Onnur fiskasløg | 991,317.20 | 1,228,657.10 | 1,163,894.90 | 825,221.60 | 693,154.10 |
| Aðrar vørður | 25,018.80 | 150,941.90 | 140,814.20 | 177,978.00 | 214,228.20 |
| Skip, Flogfør o.t. | 194,849.50 | 75,873.00 | 93,454.50 | 604,362.90 | 225,715.50 |
| Vøruútflut-ningur tilsamans | 3,586,663.40 | 3,868,650.00 | 4,056,525.90 | 4,322,801.80 | 3,986,515.90 |
| Vøruútflutningur tilsamans uttan skip og o.t. | 3,391,813.90 | 3,792,777.00 | 3,963,071.40 | 3,718,438.90 | 3,760,800.40 |

*Kelda: Hagstova Føroya*